## 100.000 danir Influensa A

Í Danmark hava meiri enn 100.000 fólk fingið Influensa A, og sambært Statens Seruminstitut merkir tað, at krímsjúkan er farin at ganga av álvara. Kåre Mølbak, sum er deildarleiðari hjá stovninum, sigur við fjølmiðlarnar, at nógvir danir verða smittaðir teir næstu 14 dagarnar, og at sjúkan fer ikki at hasa av aftur fyrr enn eftir ársskiftið. Statens Seruminstitut sigur, at síðani Influensa A fór at gera um seg fyri tveimum vikum síðani, eru umleið 200.000 danir vorðnir smittaðir. Av teimum meiri enn 100.000, sum eru við hús nú, eru tey flestu børn.



## Færri ungir sjómenn

Meðalaldurin á norskum sjómonnum hækkar støðugt, og nýggj tøl vísa, at tey seinastu tjúgu árini er meðalaldurin hækkaður 75 prosent. Norska kringvarpið sigur, at fyri tjúgu árum síðani vóru 6.697 norskir sjómenn millum 20 og 29 ára gamlir. Í fjør vóru sjómenninir í hesum aldursbólkinum 1.688 í tali. Rin granskari á lærda háskúlanum í Tromsø, sum hevur kannað viðurskiftini, er sambært NRK komin til ta niðurstøðu, at nógvir ungir menn aftra seg við at velja sær fiskivinnuna sum lívsstarv, tí tað er so dýrt at útvega sær egið fiskifar.

# Jóhan Dahl dragast í rættin

**Størsti einstaki partaeigarin í Atlantsflog, Adrian Noskwith, kennir seg nú noyddan at draga Johan Dahl í rættin. Orsøkin er, at Johan Dahl hevur blandað seg í raksturin í felagnum, og einki hevur gjørt fyri at rætta upp á tað aftur**

ATLANTSFLOG

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Johan Dahl verður drigin fyri rættin fyri at blandað seg upp í raksturin av Atlantsflogi, um hann ikki skjótt kemur við eini loysn til privatu partaeigararnir. – Tú gevur okkum einki val, sigur Adrian Noskwith, sum eigur partabvør fyri 17 milliónir í felagnum*

*Mynd: Jan Müller*

Fyri átta mánaðum síðani var rættiligt rok um Atlantsflog. Á aðalfundinum hjá Atlantsflogi tann 2. apríl í ár, ætlaði Johan Dahl at umskipa nevndina í flogfelagnum, soleiðis at privatu partaeigararnir mistu sítt einasta umboð í nevndini. Hetta elvdi til rættiligt rok.

- Føroya Landsstýrið hevur svikið ta lyftið, sum varð givið um, at landsstýrið ikki skuldi blanda seg í dagliga raksturin av Atlantsflog. Hetta lyftisbrot hevur skatt føroyska flogfelagið almikið og hevur minkað um virðið av partabrøvunum, segði Adrian Noskwith tá. Hann er størsti privati partaeigari í Atlantsflogi, og hevur keypt partabrøv í felagnum fyri umleið 17 milliónir krónur, sum svarar til góð 5 prosent.

Eftirfylgjandi skifti Johan Dahl alla nevndina í felagnum út, og komu privatu partaeigararnir tá við trimum uppskotum til Landsstýrið, til at fáa loyst málið.

Fyrsti møguleikin var at landsstýrið skuldi keypa einskildu partabrøvini aftur fyri útveganarprísin, ella skuldi landsstýrið selja sín meirilutapart fyri útveganarprísin, ella í síðsta føri at landsstýrið umskipaði einskildu partabrøvini til B-partabrøv við fastlæstari rentu.

Vegna landsstýrið skal Johan Dahl tá hava lovað at viðgerða uppskotini við vælvild.

Men nú letur Adrian Noskwith aftur hoyra frá sær.

Í eini lýsing á síðu 7 í Sosialinum í dag, kemur hann við eini innbjóðing til Johan Dahl.

### Ákæran

Adrian Noskwith skrivar soleiðis í innbjóðingini.

»Tá Føroya Landsstýri fyri tveimum árum síðani bjóðaði privatum íleggjarum at keypa partabrøv í Atlantic Airways, lovaði landsstýrið ikki at blanda seg upp í raksturin av flogfelagnum. Undir tínari leiðslu er hetta broytt.

Sjálvt um vit mótmæltu, skifti til tú vælvirkandi nevnd felagsins út og setti tínar egnu menn í nevndina. Tú hevur broytt raksturin hjá floghavnini; nakað sum ikki varð upplýst, tá partabrøvini vórðu seld, so inntøka er fluttur frá flogfelagnum til eina almenna fyritøku.

Úrslitið av hesum er, at flogferðaseðlaprísirnir eru hækkaðir, og partabrøvini verða næstan ikki handlað longur. Eingin seriøsur íleggjari ynskur at eiga ein minnilutapart í einum flogfelag, sum verður rikið av einum politikkara.

Fyri átta mánaðum síðani bóðu vit teg fylgja tí, sum landsstýrið lovaði teimum privatu íleggjarunum. Tú bað okkum um at hava álit á tær. Sambært avtalu, løgdu vit fram trý uppskot, sum hvørt sær kundi loyst trupuleikan á nøktandi hátt:

- at landsstýrið keypir okkara partabrøv aftur fyri útveganarprísin, ella
- at landsstýrið selur sín meirilutapart fyri útveganarprísin, ella
- at landsstýrið umskipar okkara partabrøv til B-partabrøv við fastlæstari rentu.«

### Landsstýrið kanska í rættin

Nú eru átta mánaðir gingnir, síðan privatu partaeigararnir settu fram hesi uppskot, men teir hava hvørki hoyrt orð ella eið frá landsstýrismanninum.

Adrian Noskwith sigur í lýsingini, at hetta snýr seg um álit, og um hvat er rætt og rímiligt, og leggur afturat, at hóast teir eru til reiðar at fáa hetta í rættlag við semju, og at teir ikki ynskja at fara í rættin, so gevur Johan Dahl teimum einki val.

»Vegna landsstýrið, lovaði tú at viðgera hesi uppskot við vælvilja. Nú eru átta mánaðir gingnir uttan at vit hava hoyrt nakað frá tær.

Hetta snýr seg um, hvat er rætt og rímiligt. Hetta er ein spurningur um álit.

Vit ynskja ikki at fara inn í eitt rættarmál. Tað verður dýrt og tekur tíð. Men tygum geva okkum onki valg. Málið loysir ikki seg sjálvt.

Tá hampulig fólk gerast ósamd, seta tey seg niður og finna eina loysn. Vit heita á teg um at fáa hetta í rættlag. Vit eru tilreiðar at hitta teg – ella ein og hvønn, sum landssstýrið tilnevnir at finna eina rímuliga og sámuliga loysn á hesum máli.«

Soleiðis skrivar Adrian Noskwith, og bendir okkurt á, at fær landsstýrismaðurin ikki greiðu á málinum skjótt, kann landsstýrismaðurin ella landsstýrið verða drigið fyri rættin.

# Hammershaimb 190 ár

Fríggjadagin 20. november 2009 verður eitt stórt tiltak í Norðurlandahúsinum, nevnt Hammershaimb 190 ár. V.U. Hammershaimb (1819-1909) kennir hvørt mansbarn í Føroyum. Hann var við til at loysa knútin um eina regluskipaða føroyska stavseting. Tað var miðskeiðis í 1800-árunum. Stavsetingin, ið ber hansara navn, er lítið og einki broytt, síðan hon av álvara varð tikin í nýtslu fyrst í 1900-árunum. Dagurin verður hildin í sambandi við, at tað í ár eru 190 ár, síðan hann var føddur og 100 ár síðan hann doyði. Tiltakið er alment og ókeypis. Byrjað verður kl. 9.00 og tað varir til umleið kl. 15.30.

Evnið verður málið í talgildum miðlum. Teir talgildu miðlarnar hava tað við sær, at tað ongantíð áður í Føroya søgu hevur verið skrivað so nógv á føroyskum sum nú. Tað serstaka við hesum miðlum er m.a. tað, at teir eru skriftligir, men sjálvur skriftformurin leggur seg ógvuliga tætt upp at talumálinum, soleiðis at úrslitið verður eitt slag av skrivligum talumáli, sum í sjálvum sær er ein andsøgn, tí at eitt eyðkenni við talumáli er, at tað ikki er skrivligt!

Við at velja hetta evnið verður roynt at venda eygunum móti einum parti av okkara samtíðarmáli. Málnýtslan í hesum elektronisku miðlunum, serliga á kjatt- og netkjaksíðum, verður mangan skírd sum óvandamál. Hvat er hetta fyri ein málformur, sum vit síggja her? Hvørja ávirkan fara hesir miðlar at hava á okkara stavseting sum frá líður? Hetta er eitt evni, sum er lítið umrøtt í Føroyum, men aðrastaðni verður granskað í hesum serliga málformi, sum mong siga hvørki er fuglur ella fiskur. Við hesum evni vilja vit varpa ljós á málið í samtíðini og partvís í framtíðini, tí hesir miðlar og hesin málformur er bara byrjanin. Hvussu verður í framtíðini? Sama hvat vit halda um hesar miðlar og málið í teimum, so stendur málið framman fyri sera stórum avbjóðingum í hesum miðlunum (sms'um, kjatti, netkjaki, teldubrøvum o.s.fr.) og í altjóðagerðini annars. Hvussu verður stavsetingin (sum ber Hammershaimbs navn) handfarin í hesum miðlunum. Millum spurningarnar, ið verða viðgjørdir:

· Eru hesir miðlar ein hóttan móti føroysku stavsetingini?
· Fer henda nýggja stavsetingin at ávirka ta regluskipaðu hammershaimbsku stavsetingina?
· Fara næmingar at duga verri at stava føroyskt í framtíðini?
· Ber til at hava ymsar stavsetingarnormar um somu tíð? O.s.fr.

Á skránni eru fyrilestrar. Tveir útlendskir granskarar fara at halda fyrilestur um málið á alnetinum. Teir eru Rickard Domeij úr Svøríki og Lene Rotne úr Danmark. Jógvan í Lon Jacobsen fer at hugleiða um arbeiðið hjá málnevndini í framtíðini. Harumframt er upplestur á skránni, har Birita Mohr fer at lesa upp úr antologiini. Kári Sverrisson og Mikael Blak fara at framføra skjaldur. Dagurin endar við einum pallborðsorðaskifti um málið í talgildum miðlum. Luttakararnir verða: Oddfríður Marni Rasmussen, Anna Ellingsgaard, Jan Berg Jørgensen, Kári Durhuus og Búi Rouch. Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, setur stevnuna klokkan 9.00. Men tað skal ikki bara vera tað rama álvarsemi, tí hava vit fingið skemtaran Jákup Veyhe at hava eina framførslu. Orðstýrari verður Jógvan Arge. Høvi verður aftan á framløgurnar at seta fram spurningar og gera viðmerkingar.

Fróðskaparfelag, Hammershaimbsgrunnurin og Norðurlandahúsið. Stovnarnir, sum hava fyrireikað dagin, eru: Føroyamálsdeildin, Føroyska málnevndin, Móðurmálslærarafelag Føroya og Norðurlandahúsið. Fyrireikingarbólkurin er mannaður við: Jógvan í Lon Jacobsen formaður, Turið Sigurðardóttir og Vár í Ólavsstovu. Lena Reinert á Føroyamálsdeildini og Vígdis Petersen á kt-deildini á Fróðskaparsetrinum hava sniðgivið skrá, faldara og plakat.